Hóast StÍF undir øllum umstøðum endar á triðja plássinum, so hava teir ikki mist spæligleðina, og nú hava teir sett ein farri av spenningi í aftur bestu mansdeildina
Mynd: Álvur Haraldsen

StÍF — VÍF 28-23 (14-11):

Ein nøs og ein tonn fyri ein sigur

Spenningurin var í hæddini tá VÍF var á vitjan hjá StÍF í høllini á Skála. Sum ikki einaferð fingu strandingar víst, at teir hava betri enn gott tak á vestmenningum, og sigurin hjá strandingum hevði við sær, at VÍF misti oddasessin til Neistan. Fyribils í hvussu er

HONDBÓLTUR - MENN
Sveinur Tróndarson

Tað leikaði hart á í ítróttarhøllini á Skála sunnudagin, tá vestmenningar vóru á vitjan. Vestmenningum torvar tveir sigrar afturat í ár og fyri teir hevði verið best um sigurin kom til høldar í høllini á Skála, tí so kundu teir taka til takkar við einum sigri antin í dystinum móti H71 ella móti Kyndli.

Men soleiðis skuldi ikki vera og avleiðingin av tí er, at VÍF ikki longur er á fyrsta plássi og at teir nú skulu og mugu vinna báðar dystirnar sum eftir eru í landskappingini, tí málúrtøka teirra ikki er so góð sum tann hjá Neistanum. Og havandi gongdina í meistaradeildini í mansflogbólti í huga, er ikki víst, at tað verður so lætt. So kappingin er aftur púra opin ...

Hví spæla tit ikki altíð so

Spurningarnir til strandingar flugu runt tá dysturin í høllini á Skála seinnapartin sunnudagin var liðugur. Áskoðararnir — teir vóru um 400 í tali — høvdu sæð eitt sera nærlagt og stríðsvilja heimalið leggja sera nógv fyri, og tí var ikki so løgið, at spælararnir sluppu at svara spurninginum, hví StÍF ikki altíð spælir, sum teir spældu sunnudagin.

Svarini fara vit ikki at avdúka, men vit kunnu bara staðfesta, at sigurin móti vestmenningum var ruddiliga uppiborin.

Tað vóru nevniliga strandingar, sum frá byrjan løgdu seg á odda og sjálvt um vestmenningar fingu javna og fylgdu við upp til 5-5, ja, so sást rættiliga týðuliga, at tað vóru strandingar sum vóru meira uppsettir, sjálvt um teir ikki høvdu annað at spæla fyri enn æruna. Men hon hevði nógv at siga sunnudagin.

Veruleikin er, at spælið hjá heimaliðnum hekk nógva ferðir betur saman enn spælið hjá vestmenningum, og tí er neyvan nakar, sum setir spurnartekin við, um sigurin var uppiborin ella ikki.

Álopsspælið riggaði til tíðir sera væl og Artur slapp næstan at gera mál sum honum lysti. Bárður Nielsen í VÍF-málinum náddi ongantíð niður til bóltin, sum Artur ferð eftir ferð smekkaði inn fram við knøunum á VÍF málverjanum.

Og so var tað Marian ...

Í hinum endanum stóð verjan sum ein rættiliga stinnur skansi og tað sjálvt um strandingar gjørdu tvær útskiftingar millum verju og álop. Artur og Costin vóru bara við í álopspartinum og sjálvt um vestmenningar royndu at seta spælið skjótt í gongd aftur, náddu teir ikki at trýsta strandingar, sum arbeiddu stak skjótt.

Aftan fyri verjupartin stóð so helst týdningarmiklasti leikarin á StÍF-liðnum sunnudagin. Enn einaferð vísti málverjin, Marian Cirloganescu, síni kynstur og tað er ikki hissini, hvat hasin maðurin hevur at bjóða.

Til tíðir tóktust vestmenningar heilt ráðaleysir tá teir nærkaðust honum, tí hann tók næstan alt sum kom ímóti honum. Tað kundi gera tað sama um teir skutu uppi ella niðri tí hann valaði næstan altíð rætt, og fekk hann ikki fatur á bóltinum, var tað um reppið at hann gjørdi tað.

Tað er einki at dylja yvir, at StÍF-liðið hevði verið munandi veikari, um tað ikki hevði Marian standandi í málinum, og tað er ein fragd at síggja hann spæla.

Vestmenningar hava knívin fyri barkan

Dysturin millum StÍF og VÍF var kanska ikki tann best spældi hondbóltsdysturin, men hann hevði tað í sær, sum ein oddadystur skal hava. Hann var spennandi og nokkso javnur tó at strandingar løgdu seg nøkur mál fram um.

Til tíðir var hann nokk so hart leiktur, men tað var ikki tí, at leikararnir vóru ófantaligir. Teir gjørdu tað dómararnir loyvdu teimum og ikki meira enn tað. Onkuntíð høvdu benkurnir lyndi til at liva í so nógv við í spælinum, men soleiðis er, tá eitt FM-heitið stendur upp á spæl.

Og tað gjørdi tað á Skála, sjálvt um tað ikki sást so væl á spælinum hjá vestmenningum. Teir royndu og til tíðir fleyt spælið rættiliga væl, men so skeikladist alt av lagið, kanska tí at verjan hjá strandingum stóð væl og helst eisini tí, at Marian stóð sum ein brandur í málinum.

Lítið er at ivast í, at vestmenningar eru svobrotnir av úrslitinum, tí teir høvdu sigurin fyri neyðini, skuldu teir kunna leika eitt sindur frítt móti H71 og Kyndli. Hendan møguleikan fáa teir ikki nú, tí nú skulu báðir dystirnir vinnast.

Sær trupult út hjá vestmenningum í løtuni, er minst líka lítið hugaligt hjá Neistanum at hugsa um, hvat teir eiga á. Neistin hevur bara tann eina dystin eftir, men tá hann verður móti StÍF á útivølli, vita teir, hvat bíðar teimum, tí sjálvt um strandingar eru vísir í, at teir enda sum nummar trý, líkamikið um teir vinna ella tapa móti KÍF og Neistanum, so vístu teir í dag, at teir ikki gevast at berjast fyri tað.

Annars kunnu vit til seinast leggja afturat, at Sveinur Justinussen hjá StÍF mátti av vølli, tá bara tveir minuttir vóru leiktir. Hann meiddi sær nøsina so illa, at hann var noyddur at fara til lækna at fáa viðgerð. Málverjin Marian Cirloganescu fekk miðskeiðis í seinna hálvleiki eitt skot beint á munnin og umframt skelkin breyt hann eina tonn. Sjálvt um hann fekk ilt gjørdi rumenin av at vera standandi í málinum, og so mátti tonn vera tonn ...

Men sigurin kostaði ...

Dysturin í tølum:
StÍF — VÍF 28-23 (14-11)
Málskjúttar:
StÍF: Artur Johansen 9 (4), Costin Dumitrescu 7, Marius Joensen 3, Alexandur Johansen 3, Jón Rasmussen 2, Bent Djurhuus 2, Anfinnur Joensen 1 og André F. Danielsen 1
VÍF: Áki Olsen 6, Rógvi Nielsen 5, Sámal Joensen 4 (1), Ingi Olsen 4, Johnny Joensen 2, Ragnar Zachariasen 1 og Piti Negru 1
Brotskøst: StÍF 5, VÍF 2
Útvísingar: StÍF 2, VÍF 4
Dómarar úr Neistanum/Kyndli: Kristian Johansen og Eyðun Samuelsen

AB sendi ÍF úr kappingini

Sandoyingar skulu spæla ímóti sumbingum, og argjamenn skulu spæla ímóti vágamonnum um eitt pláss í bólkaspælinum

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Enn er tað ikki greitt hvørji lið úr lægru deildunum skulu saman við teimum tiggju liðunum í 1. deild í bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið. Um vikuskiftið kom svarið eitt sindur nærri. Nú er tað greitt, at grannafeløgini í Leirvík og Fuglafirði ikki skulu brúka meiri tíð og orku uppá steypakappingina. Heldur skulu tey brúka tíðina uppá at fyrireika seg til landskappingina, sum tað verður farið undir fyrsta vikuskiftið í mai.

Neyvan kemur tað serliga illa við hjá teimum. Í fjør var ÍF við í bólkaspælinum, og teir stóðu seg hampuliga væl. Men tað gekk út yvir fyrstu umførini í landskappingini, tá teir so at siga fóru niður við nakkanum, áðrenn teir reistu seg aftur og vóru um reppið at kvalifisera seg til bestu deildina.

Men tað er einki at reypa av hjá ÍF, at teir sunnudagin í Runavík – ov nøgvur kavi á vøllinum í Fuglafirði hevði við sær, at dystrin mátti flytast – taptu 2–1 ímóti AB, sum hevur nýggjan venjara. Hann eitur Sámal Erik Hentze. Hann hevur havt ábyrgdina av næstbesta liðnum hjá HB, umframt at hann hevur spælt í HB og eisini í B68, har hann var á besta liðnum.

Fótbóltsliga var tað einki at reypa av í Runavík. Spælararnir hava millum lítið og einki vant við bólti, og tað sást væl aftur á kavaleysa vøllinum. Alt sá út at ganga, sum tað frammanundan var roknað við, tá Heini Heinason miðskeiðis í 1. hálvleiki legði ÍF á odda. Men í 32. minutti javnaði Johnny Samuelsen, og átta minuttir fyri leiklok skoraði Flóvin Jespersen sigursmálið fyri AB. ÍF málverjin tók bóltin, tá ein av hansara egnu legði aftur. Dómarin dømdi óbeinleiðisfríspark í brotsteiginum, og so var mál.

Bara heimamenn

Undanfarnu árini hevur B71 havt nógv fremmant fólk á liðnum. Í ár hava teir fingið tveir nýggjar pólverjar at koma henda vegin. Hvør dugur er í teimum bar ikki til at siga nakað um, tá B71 leygardagin tók ímóti LÍF. Spæliloyvini vóru ikki komin upp á pláss.

Talan var um eitt sandoyarlið burturav. Valdemar Nowisci var sjúkur. Tí vardi bara 16 ára gamli Jógvan Olsen B71 málið, og á liðnum vóru saman við fleiri veteranum fýra spælarar, sum í fjør høvdu dreingjaliðsaldur.

B71 vann 3–2, og ein av ungu monnunum skoraði tvey mál. Tað var Tummas Pauli Olsen, sum undanfarin ár onkra ferðina hevur verið á yngru landsliðunum.

LÍF, sum hevði Karstin Joensen í málinum, var aftanfyri 3–0, áðrenn teir fingu hol á. Tá teir minkaðu um munin til 3–2, var eingin tíð eftir. Karstin Joensen hevur áður spælt við KÍ. Hann er kendur frá yngru landsliðunum.

Útseta kanska

B71 skal á útivølli spæla um pláss í bólkaspælinum ímóti Sumba. AB skal spæla ímóti FS Vágum.

Sambært skránni skuldi fyrsta umfarið í bólkaspælinum verið á skránni komandi vikuskifti. Fyrrapartin í gjár var ikki greitt, nær dystirnir í Vágum og í Sumba verða spældir. Tað hevur verið tosað um, at AB skal vestur í Vágar hóskvøldið.

At fáa dystin í Sumba frá hondini mitt í viku man ikki vera sum at siga tað. Tí hevur møguleikin verið nevndur, at hesir báðir dystirnir skulu spælast komandi vikuskifti, og at tað ikki verður spælt í bólkaumfarinum fyrrenn annað vikuskifti.

Tá skráin fyri bólkaumfarið varð løgd, var ein dystardagur lagdur av til landsdyst ímóti Íslandi, áðrenn fyrsta umfarið í landskappingini skal spælast. Eftir at Føroyar og Ísland eru komin í sama bólk í EM undankappingini, er landsdysturin avlýstur. Tað vil siga, at tað er rúm fyri at útseta bólkaspælið eina viku. Feløgini hava neyvan nakað ímóti at útseta. Kavin hevur havt við sær, at tað ikki hevur verið møguleiki fyri at venja so nógv við bólti, sum tað hevði verið ynskiligt.

ÍF–AB 1–2 (1–1)
1–0: Heini Heinason 26.
1–1: Johnny Samuelsen 32.
1–2: Flóvin Jespersen 82.

B71–LÍF 3–2 (2–0)
1–0: Tummas Pauli Olsen 21.
2–0: Jónsvein Thomsen 42.
3–0: Tummas Pauli Olsen 53.
3–1: Kristian í Vági 70.
3–2: Tomek Rezel 90.

Krubban er tóm í Hvidovre

Peter Schmeichel hevur tikið seg aftur, og eftir summarsteðgin verður eingin fullatíðar yrkisspælari í felagnum hjá Óla Johannesen

ÚTISETAFELAG
Jóannes Hansen

Ætlanirnar hjá Peter Schmeichel at fáa Hvidovre aftur millum bestu fótbóltsfeløgini í Danmark verða ikki til veruleika. Dreymurin var, at Hvidovre skuldi vera millum seks tey bestu í næstbestu deildini í hesum kappingarárinum, og at teir skuldu vinna sær uppflyting komandi kappingarár.

Veruleikin er, at Hvidovre er ikki so langt frá niðurflytingarlinjuni, og vánirnar fyri at tað skal ganga so nógv øðrvísi, eru einki serligar.

Jan Sørensen sigur, at eingin leikari verður fulla tíð í Hvidovre eftir summarsteðgin

Síggja botnin

Fríggjadagin varð greitt, at tíðin hjá Peter Schmeichel sum fíggjarligur høvuðsstuðul hjá felagnum, sum hann í síni tíð vardi málið hjá, er liðug. Úr Birmingham, har fyrrverandi danski landsliðsmálverjin tænir Aston Villa, vóru boðini, at flytingarnar av kontoini hjá Schmeichel og til Hvidovre vóru vera fleiri. Málverjin, sum í Sporting Lissabon og Aston Villa ivaleyst fleiri ferðir hevur vunnið tað aftur, sum hann hevur flutt til Hvidovre, sigur seg ikki hava møguleika at stýra danska felagnum. Tá hann fyri trimum árum síðani fór uppí Hvidovre ætlanina, var hann á veg heim til Danmarkar. Seinni broytti hann kós, og nú verður tað í fyrsta lagi í 2003, at hann fer at gevast sum yrkisspælari.

Hetta seinasta árið hevur Hvidovre ikki fingið serligar upphæddir frá Schmeichel. Teir hava repað seglini, og nú siga teir seg ikki duga at ímynda sær, at teir skulu megna at keypa seg til tað, sum skal til, um dreymurin um superligina skal gerast til veruleika. Kassin er tómur.

Ongar spælarar fulla tíð

Í løtuni eru einir tíggju spælarar í fulltíðar starvi í Hvidovre. Millum teirra er liðformaðurin á føroyska landsliðnum, Óli Johannesen. Nú er nakað síðani, at hann kom á sølulistan, sum felagið hjá fótbóltsspælarum í Danmark hevur. Sáttmálin hjá Óla við Hvidovre gongur fram til 30. juni. Tað er greitt, at hann ikki verður longdur eftir somu treytum, sum higartil hava verið galdandi.

Ætlanir eru um at selja málverjan, Stephan Andersen, sum í síðstu viku var í Sunderland og royndarvandi:

– Sáttmálaskeiðið hjá øllum teimum 7-8, sum arbeiða fulla tíð hjá okkum, verður liðugt 30. juni. Vit fáa ikki so nógv burturúr at hava so fáar í fulltíðarstarvi. Hvussu tað so verður er ikki avgjørt enn, sigur Jan Sørensen, sum er stjóri í felagnum.

Taptu grannauppgerð

Eitt mál í seinasta minuttinum feldi Julian og Hull City, tá teir leygardagin spældu lokaluppgerð móti Scunthorpe

ONGLAND
Jákup Mørk

Framman fyri fullari heimaáskoðarafjøld kiksaði Hull City enn einaferð, tá teir leygardagin spældu grannauppgerð móti Scunthorpe.

Roknað varð alla tíðna við, at talan fór at gerast um ein torføran dyst hjá Julian og teimum, men at lagnan skuldi gerast teimum so hørð, hevði fáur grunað. Fram til seinasta minuttin var nevnliga talan um javnstøðu millum grannarnar, sum báðir stríðast fyri uppflytan, men í seinasta minuttinum fekk Scunthorpe fríspark, sum Mark Jackson smekkaði beinleiðis í netið.

Úrslitið hevur við sær, at Julian og teir nú eru dotnir niður um sjeynda plássið, sum gevur rætt til sonvendu play-off dystirnar um uppflyting, so hóast venjaraskifti og ónøgd millum áskoðararnar annars, so er enn ikki líkt til, at teir í Hull megna at venda vánaligu gongdini.

Hart í Hollandi

Í einum hørðum dysti við ikki færri enn 41 fríspørkum eydnaðist leygardagin FC Zwolle at vinna sær enn ein sigur, tá teir høvdu vitjan av Harleem, sum liggur miðskeiðis á stigatalvuni.

Avgerandi málið kom longu í 3. minutti, tá Richard Roelofsen fann vegin fram til meskarnar, men fyrri tað var dramatikkurin als ikki liðugur. Sum nevnt var talan um hópin av fríspørkum, og umframt at hetta kostaði gult kort til fleiri leikarar, so merkti tað eisini, at Zwolle misti tveir leikarar afturat. Sum kunnugt varð Súni Olsen skaddur í seinastu viku, og nú fer av álvara at sansa at hjá Zwolle, og tíðarfestingin fyri hetta er hin ringast hugsandi. Komandi tvær vikurnar skulu teir nevnliga royna seg móti tveimum av liðunum, sum eisini royna at tryggja sær uppflytan, og tá verður tørvur á øllum góðum kreftum, um dreymurin um heiðursdeildina skal gerast veruleiki á hesum síðuni.

-jm